# Stórt føstulávints-tiltak á Kambsdali




**Í dag, leygardagin kl. 14, verður tunnusláttur í høllini á Kambsdali, og aftaná letur stóra leikalandið upp, har stór og smá kunnu stuttleika sær til mánadagin**

FØSTULÁVINT
*Tíðindaskriv*

Ársins stórsta føstulávintstiltak verður í høllini á Kambsdali leygardagin 21. til mánadagin 23. februar. Á skránni er tunnusláttur, hoppiborgir, perlur, minitivoli og mangt annað til børn og vaksin.

Tiltakið er opið soleiðis: Leygardagin 21. februar frá 14-21, sunnudagin 22. februar 14-21 og mánadagin 23. februar 15-21.

Leygardagin kl. 14.00 verður tunnusláttur fyri børnum í aldursbólkunum 0-6 ár og 7-14 ár. Kattakongurin fær vinning. Eftir tunnusláttrurin verður kakao og føstulávintsbollar til øll. Eisini bjóðar MBM børnunum pop top.

Sunnudagin kl. 17 undirhalda Angela og Hannibal.

Túra-pass, ið eru galdandi ein heilan dag kosta 150,- Annars fáast eisini atgongumerki til teir einstøku aktivitetirnar, og hesi kosta kr. 20,- fyri eitt ella 6 fyri 100,-.

Mánadagin 23. februar kl. 21 verður drigið millum øll keypt túra-pass, teir dagarnar tiltakið hevur verið. Vinningurin er flogferð fyri tveir persónar frá Atlantic Airways, til eitt av teirra ferðamálum. So kom í ítróttarhøllina á Kambsdali og hav tað stuttligt saman við okkum.

# Tunnusláttur á Tvøroyri

FØSTULÁVINT

Sunnudagin kl 14 skipar sjóverjuskipið fyri tunnuslátri á Tvøroyri. Eftir sláttturin verður kakao og bollar at fáa og víst verður runt á skipinum.

Kl. 16:00 fer tyrlan hjá sjóverjuni at hava framsýning á fjørðinum.







Eystara Bryggja · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 60 · Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

## Søkt verður eftir einum fólki til Farmadeildina

**Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til avgreiðsluna á Farmadeildini. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.**

**Starvið fevnir um:**
- Avgreiðslu av inngangandi farmi
- Kundaavgreiðslu
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Tollavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

**Umsóknir:**
Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til:

***Smyril Line***
***c/o Heðin Joensen***
***Postsmoga 370***
***FO-110 Tórshavn***

ella við telduposti til:

hedinj@smyril-line.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 5. mars 2004.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 34 59 60.

Smyril Line varð stovnað í 1982, við tí endamáli at knýta saman londini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveis, Beneluks, Fraklandi og Italiu.

Farmadeildin varð sett á stovn í 1998, við høvuðsskrivstovu í Tórshavn. Í Danmark hevur felagið farmastøðir í Hanstholm, Kolding og Hedehusene.

SMYRIL LINE

SMYRIL LINE



Brævaloysnin er nýggj gjaldsmidling frá Føroya Banka, og sum tað eisini liggur í navninum, er hendan loysnin grundað á vanligan brævbjálva. Brævaloysnin er serliga ætlað teimum, ið ikki hava HeimaBanka ella Netbanka, ella har peningastovnur ella posthús ikki er á staðnum.

**Einføld skipan**
Brævaloysnin er einføld at nýta, og haraftrat er vegleiðing prentað á baksíðuna á hvørjum brævbjálva.

**Ómaksleyst**
Við Brævaloysnini er tað skjótt og ómaksleyst at avgreiða rokningarnar. Tú sleppur undan at skunda tær í bankan ella á posthúsið í døgurðasteðginum, ella at standa í bíðirøð beint fyri afturlatingartíð. Frímerki skalt tú heldur ikki hugsa um, tí postgjaldið er goldið.

Vilt tú hava gjøllari upplýsingar um Brævaloysnina, ert tú vælkomin at seta teg í samband við tína bankadeild.

FØROYA BANKI



# Birgir Enni vaskar og málar Norðlýsið

**Dúgvan er til árligt eftirlit og liggur nú við bryggjuna, har restin av arbeiðinum verður gjørt**

SKIP OG UMVÆLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur skonnartin, Norðlýsið, staðið á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Tað er tó ikki stórvegis, sum gjørt verður við skipið.

– Hetta er vanligt viðlíkahald, sum Birgir Enni sjálvur tekur sær av. Botnurin verður vaskaður og málaður.

Á Skipasmiðjuni siga tey, at nú minni er at gera á bedingini, var høvi hjá Birgiri at fáa skonnartina upp.

## Dúgvan og Vitin

Herfyri stóð strandfaraskipið, Dúgvan, á bedingini. Hon er til árligt eftirlit og liggur nú við bryggjuna, har restin av arbeiðinum verður gjørt.

Sandbáturin, Vitin hjá Sandgrevstri í Fuglafirði, er eisini tikin upp, men sum skilst á Tórshavnar Skipasmiðju, er ikki tað stóra at gera við skipið.

– Viðhvørt er gott pláss á bedingini; aðrar tíðir er trongligt. Í løtuni er ikki nógv bedingsvirksemi. Soleiðis er tað nú einaferð í hesi »bransjuni«, siga tey á Tórshavnar Skipasmiðju.



*Skonnartin, Norðlýsið, stendur á beding á Tórshavnar Skipasmiðju til botnvask og botnmáling*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gøtumenn stovna bátafelag ella undirhús

BÁTAFELAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gøtumenn vilja nú hava eitt bátafelag ella undirhús. Hetta verður ætlandi avgjørt á fundi í Glyvrahanusarhúsi í Norðrgøtu í kvøld kl. 19.

»Ætlanin við fundinum er, at eldri fólk í bygdini hava eitt stað, har tey kunnu hittast og taka sær av løttum«.

Soleiðis verður sagt í tíðindaskrivi, sum stigtakararnir hava sent fjølmiðlunum.

- Við at lýsa til fundar, vilja vit vita, um áhugi er til staðar. Er áhugi fyri at stovna eitt felag, verður eisini stovnandi aðalfundur í kvøld, siga fyrireikararnir.


30" BÁTUR til sølu (við fiskiloyvi)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorur: | Perkins | Vanliga skrúvu | |
| Megi: | 175 HK | Mesta ferð: | 15-16 míl |

Útgerðin umfatar m.a. 4 oljutrýstsnellur, litekkolodd, VHF, GPS við korti v.m.
Møguliga í býti við annan bát.

SISERO 351800

www.batasolan.com
Søla, keyp og umbýti av nýggjum og brúktum fiski-, ali- og frítíðarbátum
**... vit eru hollir í bátaráðum!**

BÁTASØLAN
v/ Sámal J. Joensen
Sundsvegur 11 • FO-100 Tórshavn
tel 32 16 66 • fax 32 17 66 • far 21 48 42
info@batasolan.com • www.batasolan.com

UMBOÐSRÁÐSVAL 2004

## Verið við at velja

**Í ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna**

INNKOMIN VALEVNI ERU HESI:
Árni Jakobsen, Smærugøta 19, Tórshavn
Atli Hansen, Norðragøta
Birgir Waag Høgnesen, Vestmanna
Brynhild í Jákupstovu, Tvørgøta 9, Tórshavn
Djóni Ziska, Millum Gilja 7, Hoyvík
Emil Jacobsen, Skála
Elin Heðinsdóttir Joensen, Hoyvíksv. 22a, Tórshavn
Erling Dalsgaard, Dalagøta 11, Tórshavn
Heini Lützen, Kristiansgøta 23, Hoyvík
Herman Winther, Skopun
Hervør Hergudóttir, Bøur
Ingeborg Godtfred, Garðsgøta 21, Argir
Jákup Egholm Hansen, Sandavágur
Jógvan Durhuus, Vestmanna
Jógvan L. Rasmussen, á Frælsinum 8, Tórshavn
Jóhan Mortensen, Spógvavegur 57, Tórhavn
Jona Ulrikka Nielsen, Undir Fossum 44, Klaksvík
Klæmint Olsen, Vesturgøta 14, Tórshavn
Marin í Dali, Tórsbyrgi 10, Tórshavn
Poul Johannes Joensen, Vágur
Regin Hammer, Hanusargøta 7, Tórshavn
Rói Egholm, Hagagøta 6, Argir
Ronald Poulsen, Turiðargøta 27, Tórshavn
Súni Vinther, Hvarvið 1, Tórshavn
Tummas Jacobsen, Spógvavegur 6, Tórshavn

ATKVØÐURÆTTUR
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2004.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn kr. 50.000,- hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harafturat, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.

Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast frá 18. februar 2004 til og við 2. mars 2004 á øllum deildum felagsins. Atkvøðuseðil kann umbiðjast persónliga ella við at ringja til tel 345600, senda fax til 345601 ella teldupost til tf@trygging.fo.

Neyðugt er, at viðskiftafólk, ið persónliga biðja um atkvøðuseðil á deildum felagsins, hava samleikaprógv við sær. Verður atkvøðuseðil umbiðin um tel, fax ella teldupost, er neyðugt at upplýsa um navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur á *Høvuðsskrivstovu* felagsins, í seinasta lagi mánadagin 8. mars.

VALÚRSLIT
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum.

Tórshavn, 18. februar 2004
Stjórnin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

www.sansir.fo